# MEKTA søkir starvsfólk

### Vørusamskipari til MEKTA

MEKTA søkir eftir fólki til at samskipa allar vøruflytingar hjá fyritøkuni.
Starvið umfatar í høvuðsheitum:
- Skipa goymslustýringina hjá MEKTA í Navision
- Innkeyp og útflýggjan av vørum
- Goymslustýring sum heild (logistikk).

Førleikakrøv:
- Hóskandi útbúgving (t.d. elektrikari ella aðra hóskandi útbúgving Minsta kravið er miðnámsútbúgving)
- Dugir væl at samskifta við fólk og tað eisini á donskum og enskum
- Áhuga fyri tøkni
- Vera røkin.

Fyrimunur er, um tú hevur royndir innan onkur av økjunum EL, KT og vørusølu.

Starvið er nýtt virkisøki, ið tú í stóran mun sjálv/ur kemur at menna.
Lønin verður avtalað.

### KT-tøkningur til MEKTA

MEKTA søkir eftir KT-tøkningi til KT-tænastudeildina.
Starvið umfatar í høvuðsheitum:
- Netumsiting
- IP-tøkni
- Røkt av Windows Servarum
- Røkt av hardware
- Uppseting og røkt av tøkniligum undirvísingarmiðlum.

Førleikakrøv:
- Hóskandi útbúgving (t.d. datamatikari, IT-supportari, verkfrøðingur)
- Dugir væl at samskifta við fólk og tað eisini á donskum og enskum.

Fyrimunur er, um tú hevur royndir innan onkur av økjunum, ið starvið umfatar.
Lønin verður avtalað.

### El-lærlingar til MEKTA

MEKTA søkir eftir tveimum el-lærlingum.

Lærutíðin er 4 ár og starvsstaðurin Saltangará.

Umsóknir, við viðkomandi prógvum og viðmælum, skulu vera okkum í hendi innan 12. oktober og kunnu sendast til:

MEKTA P/F.
Heiðavegur 25
FO-600 Saltangará

Ella til mekta@mekta.fo

Meira fæst at vita meira um størvini og MEKTA frá Kára Sigvardsen á kari@mekta.fo, ella á tel. 23 61 64.

MEKTA
Heiðavegur 25
FO-600 Saltangará
Tel 61 61 61
mekta@mekta.fo

MEKTA er nýtt EL og KT-samtak við heimstaði í Saltangará. MEKTA veitir EL-innleggingar, EL-tøkni og grundleggjandi KT-tænastur umframt at fyritøkan hevur sølu av EL og KT-útgerð. Hjá MEKTA starvast í løtuni 16 fólk.

KREA


M A R K N A Ð A R R Á K

V I K A 40 2007

## PARTABRØV ÁHUGAVERD AT KEYPA

Hóast ídnaðarálitið og tøl yvir húsamarknaðin í USA í farnu viku gjørdust verri enn væntað, fingu góðir roknskapir fra m.a Microsoft og Apple og positiv viðmæli frá gamla tjóðbankastjóranum Alan Greenspan, evropisk partabrøv at hækka 2,7% farnu vikuna.
Kaupthing hevur í fleiri vikur mælt partabrævaíleggjarum frá at gera íløgur, til størri vissa er fingin fyri gongdini. Men bæði evropiski og norrøni marknaðirnir eru nú komnir so mikið fyri seg aftur, at partabrøv eru áhugaverd at keypa aftur til langtíðar íløgur.

## HELDUR DOLLARIN FRAM AT LÆKKA?

At amerikanska álitistalið ISM eisini gjørdist slakari enn væntað, styrkir trúnna uppá at røðin av smáttfallandi lyklatølum fer at halda fram eina tíð aftrat. Um so verður, kann væntast at amerikanski tjóðbankin fer at lækka rentuna tvær reisurnar aftrat í ár. ECB vil hóast príshækkingar neyvan hækka rentuna fyrr enn ófriðurin á fíggjarmarknaðinum hevur lagt seg. Um rentumunurin millum Evropa og USA ikki minkar, økir tað trýstið á dollaran og hesin kann lækka eitt vet aftrat fram til ársskifti. Bretski tjóðbankin fer væntandi at halda rentuna óbroytta hóast stóra búskaparvøksturin, soleingi óvissan framhaldandi valdar á fíggjarmarknaðunum. Bretska pundið, sum er lækkað nógv í seinastuni, lækkar neyvan meira, men fer heldur at sveiggja á hesum støðinum komandi tíðina.

## RENTURNAR ÓBROYTTAR

Renturnar eru óbroyttar í mun til fyri viku síðan. 10-ára lánsbrævarentan er 4,46%. Óbroyttu renturnar vísa eisini óvissuna um gongdina á virðisbrævamarknaðunum.

## HVAT SIGA TJÓÐBANKARNIR?

Hesa vikuna verður serliga áhugvert at fylgja við hvat sagt verður frá rentufundunum hjá Bank of England og ECB, og um ECB vil seta nøkur tiltøk í verk fyri at sissa fíggjarmarknaðirnar. Rentan verður neyvan broytt hvørki í Bretlandi ella Evropa. Arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA, sum kemur fríggjadagin, hevur eisini stóran áhuga, serliga tí undanfarna gjørdist sera vánalig. Hesi nevndu viðurskifti fara at ávirka virðisbrøv hesa vikuna.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1497,32 | + 6,42% |
| Alheims partabrøv | 8639,46 | + 3,48% |
| Atlantic Petroleum | 1465,00 | + 2,88% |
| Føroya Banki | 228,00 | + 5,07% |
| Eik Banki | 648,00 | -2,11% |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,30 | + 1,21% |
| USD | 523,87 | -1,01% |
| JPY | 4,53 | -1,77% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo**

KAUPTHING BANK